# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 3/2025: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2025** (Flyting av stjórnarráðum og Eirargarður 2 nýtast til lestrarbústaðir)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 14. august 2025, og eftir 1. viðgerð 28. august 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. september 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Súsonnu Bertholdsen, landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við Landsverki.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur lagt fram uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri Løgtingið. Samanumtikið gevur eykajáttanaruppskotið eitt hall á 0,8 mió. kr. (RLÚ 1).

Á § 11 Heilsumál verður biðið um 0,4 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Heilsumálaráðið verður hækkað við 420 tús. kr.

Á § 12 Almanna- og mentamál verður biðið um 0,4 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Almanna- og mentamálaráðið verður hækkað við 420 tús. kr.

Á § 18 Umhvørvismál er umbønin útreiðsluneutral. Biðið verður um nýggja útreiðsluneutrala løgujáttan til Bygning til lestrarbústaðir. Bygningurin er av meklara virðismettur til 45 mió. kr.

Heilsumálaráðið skal leiga hølini hjá LÍV í Kopargøtu. Undir hoyringini í nevndini hevur verið greitt frá, at Heilsumálaráðið hevði kannað fleiri ymisk onnur leigumál, men antin var fermetraprísurin ov høgur ella hølini ikki egnað til endamálið. Kostnaðurin í Kopargøtu er 1.300 kr. pr. m2. Eigarin ger eina íløgu á 1 mió. kr., ið er roknað inn í leiguna. Landsverk hevur góðkent leigumálið. Í Kopargøtu eru 18 skrivstovur og tvey fundarhølir. Tekøkur er í bygninginum, men annars verður kantina saman við landsstýrinum í Tinganesi. LÍV ber útreiðslurnar av bygningstrygging, uttandura viðlíkahaldi og neti. Hølini hava ikki wc til rørðslutarnað, men hetta er teknað og verður gjørt seinni. Viðvíkjandi størri fundum, so ber til at brúka hølini í Tinganesi ella at leiga hølir í býnum, um tað gerst neyðugt.

Nú Heilsumálaráðið flytir í leigað høli, er upplýst fyri nevndini, at neyðugt verður at hækka játtanina til ráðið á fíggjarlógini fyri 2026 við umleið 0,9 mió. kr, sum samsvarar við leigukostnaðin fyri leigumálið.

Heilsustýrið er longu flutt úr Eirargarði í hølir á Óðinshædd. Leigukostnaðurin verður í ár hildin innanfyri raksturin. Komandi ár verður leigan løgd aftrat rakstrarjáttanini. Upphæddin verður umleið 0,5 mió. kr.

Viðvíkjandi sjúkraflutningstænastuni verður m.a. leiðreglur viðvíkjandi ferðslu skipað saman við Bústøðum, eins og tað er við bæði aðalráðini, sum eru í Eirargarði 2 í løtuni.

Viðvíkjandi parkeringsplássum eru krøvini hjá Tórshavnar kommunu í samband við lestrarbýli 0,5 pláss pr. bústaðareind. Tað eru tilsamans 35 parkeringspláss við Eirargarð 2.

Viðvíkjandi rakstrinum av verandi bygningi hava aðalráðini havt felags móttøku og bókhald, og vóru hesar útreiðslur saman við olju, el, ABA-anleggi v.m 2,2 mió. kr. í 2024. Ætlanin er at halda fram við felags bókhaldi. Til viðlíkahald og dagføringar hevur Landsverk brúkt góðar 4 mió. kr. í 15 ár.

Frá tí at eykajáttanin er samtykt metir Heilsumálaráðið, at tað tekur átta vikur at verða klár at flyta. Ráðið hevur undir hoyringini víst á, at tað eru fleiri synergi effektir við at verða tætt við Tinganes. Nógv spard koyring, lættari at samskifta og arbeiða saman.

Landsstýrismaðurin í almanna- og mentamálum hevur undir hoyringini greitt frá, at tey eru væl nøgd við Eirargarð, men vilja flyta, so at bygningurin kann brúkast til lestrar- og ungdómsbústaðir.

Farið verður úr umleið 1.000 m2 niður í umleið 620 fermetrar; 450 fermetrar á Bryggjubakka og 170 fermetrar í Skibsted.

Mentamáladeildin flytir inn í Skibsted; har verður ongin leiga, tí tey nýta fermetrar, ið landið eigur. Almannamálaráðið og Javnstøðunevndin flyta inn á Bryggjubakka 27, har Arbeiðs- og brunaeftirlitið og Tunnilsfelagið hava hildið til. Tey fáa 15 skrivstovur, kaffistovu og tvey fundarhølir. 3. hædd verður innrættað til skrivstovur, sum tað ikki hevur verið brúkt til áður. Leigan verður 1.376 kr. pr. m2 umframt kostnaðin fyri umbygging, sum verður goldin aftur yvir leiguna í seks ár. Rørslutarnað fara at sleppa inn í niðastu hæddina, har tað eru wc-facilitetir til rørslutarnað og eitt fundarhøli.

Greitt hevur verið frá, at tey í Almannamálaráðnum hava lagt seg eftir at gera so lítið inntriv í bygningin sum gjørligt, og at tey taka eisini innbúgvið við sær úr verandi hølum. Verður eykajáttanin samtykt, vænta tey at flyta í januar. Eins og Heilsumálaráðið vænta tey eisini at fáa størri synergi effekt við at verða nærri Tinganesi.

Nú Almanna- og mentamálaráðið flytur í leigað høli er upplýst fyri nevndini, at neyðugt verður at hækka játtanina til ráðið á fíggjarlógini fyri 2026 við umleið 0,9 mió. kr, sum samsvarar við leigukostnaðin fyri leigumálið.

Undir hoyringini hevur landstýriskvinnan í fíggjarmálum víst á, at hetta málið fyri ein part snýr seg um at gagnnýta ónýttar fermetrar í Tinganesi; hølir, ið eru umvæld og innrættað av nýggjum.

Tað eru fleiri bygningar, ið enn mangla at verða umvældir. Kristnastova verður umvæld nú; aftaná er ætlanin at umvæla Skansagarð og Evensens pakkhús. Evensens pakkhús er fortreyt fyri, at umstøður verða til størri fundir og tvørgangandi arbeiði millum ráðini. Greitt hevur verið frá, at sum frá líður kann miðfyrisitingin verða meira savnað í Tinganesi.

Fíggjarmálaráðið hevur greitt frá, at útreiðsluneutrala løgujáttanin til Bygning til lestrarbústaðir er sambært meginregluni í galdandi roknskaparkunngerð. Á tí einu síðuni verður bygningurin inntøkuførdur sum brutto inntøkujáttan í samband við avhendan, meðan hann á hinari síðuni verður útreiðsluførdur við samsvarandi upphædd sum løgustuðul til Bústaðir.

Landsverk heldur, at nýggja metingin av virðinum á bygninginum er á góðari leið, um man samanber við fermetraprís og hús í sama aldri. Í metingini verður nevnt, at ongin klimaskermur er, men hetta er sambært Landsverki ikki akutt, uttan so at ynski er um at gera hetta í mun til orkuspurningin. Vindeyguni eru skift fyri nøkrum árum síðani, og ongir lekar eru. Takið er umvælt. Bygningurin hevur hildið sær ótrúliga væl í mun til aldurin, tá ið hugsað verður um, hvussu lítlar upphæddir eru brúktar til viðlíkahald. Skoytt hevur eisini verið uppí, at við tað at tvey aðalráð hava verið í bygninginum, so er hann eisini hildin tað betur innan.

Í mun til spurningin um íløgan loysir seg, so fer leiguinntøkan at liggja um á leið 2 mió. kr. um árið, alt eftir hvussu nógv leigumál verða. Landsverk og Fíggjarmálaráðið hava greitt frá, at vanliga verður sagt, at árligu leiguinntøkurnar kunnu verða upp til 4% av virðinum á bygninginum. Við tað at bygningurin verður latin fyri onki, so er tað bara íløgan í umvælingina, sum skal forrentast.

Vísandi til, at bygningurin er virðismettur til 45 mió. kr., sum er 5 mió. kr. lægri enn fyribils metingin, setir nevndin fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 18 Umhvørvismál

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **18.22.1.** | **Ymsar útreiðslur** | | | |
| 02. | Bygningur til lestrarbústaðir (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **45.000** | **45.000** |

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**
Við hesum broytingaruppskoti verður inntøkujáttanin lækkað úr 50 mió. kr. niður í 45 mió. kr. og útreiðslujáttanin somuleiðis.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 8. september 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Dennis Holm | Hanna Jensen | Magnus Rasmussen |
| | Steffan Klein Poulsen | |